umhvørvisstovan

HÚSAVÍKAR KOMMUNA

230 HÚSAVÍK
FØROYAR

Argir hin 6. januar 2012
Málsnr.: 11/00025-11
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Heidi Hansen

**Spillivatnsætlan góðkend**

Við hesum skal verða boðað frá, at Umhvørvisstovan hin 06.01.2012, sambært § 18, stk. 2 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, og í § 4, stk. 2 í kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn, hevur góðkent spillivatnsætlanina hjá Húsavíkar kommunu fyri tíðarskeiðið 2011-2015.

## 1. Umsókn og viðgerð

Umhvørvisstovan fekk hin 20.12.2011 spillivatnsætlanina hjá Húsavíkar kommunu til góðkenningar (mál nr. 11/00025-7). Ætlanin er gjørd av Martin E. Leo, ráðgevandi verkfrøðingum, og hevur Húsavíkar kommuna tann 30.11.2011 samtykt ætlanina, ið Martin E. Leo hevur gjørt (mál nr. 11/00025-10).

Út frá eini heildarmeting av upplýsingunum í ætlanini verður mett, at komandi spillivatnsskipan í kommununi lýkur ásetingarnar í §§ 8-13 í kunngerðini um spillivatn.

Húsavíkar kommuna hevur tó søkt um undantak frá ásetingunum í § 10, stk. 1 og § 11, stk. 1 í kunngerðini um spillivatn í Djúpadali, sum sigur at spillivatnsútleiðingar skulu leiðast út á sjógv og skulu í minsta lagi vera ein metur undir størstu fjøru. Her hevur kommunan valt eitt niðurseyðringarannlegg.
Undantak verður givið við heimild í § 10, stk. 2 í kunngerðini um spillivatn.

Góðkenningin umfatar einans krøv ásett í spillivatnskunngerðini, t.v.s. tann umhvørivsliga partin av spillivatnætlanini. Góðkenningin tekur ikki støðu til hvørjar tekniskar loysnir eru valdar og um teknisku viðurskiftini sum heild eru í lagi, so sum dimensionering o.s.fr. Hetta er ábyrgdin hjá kommununi.

Um tað seinni vísir seg, at spillivatnsskipanin elvir til dálking, t.d. uppsavnan av evnum og tilfari, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum ella til smittuvanda, skal kommunan, sambært § 10, stk. 3 í kunngerðini um spillivatn, fremja bøtandi atgerðir, so sum økta reinsing ella føra spillivatnið longur út.

## 2. Kunngerð og kæra

Góðkenningin av spillivatnsætlanini verður lýst á heimasíðu okkara og við almennari lýsing, har tað eisini verður kunnað um at góðkenningin, sambært § 60, stk. 2 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, kann kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum innan 4 vikur frá at góðkenningin er alment kunngjørd.

Kærurætt hava tey, sum avgerðin hevur týðandi persónligan týdning fyri.

Suni Petersen, settur deildarleiðari

/

Heidi Hansen, umhvørvisviðgeri

**Avrit:** Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postboks 9, FO-110 Tórshavn
Martin E. Leo, Tórsgøta 24, FO-100 Tórshavn